VIÐMERKINGAR

# Ogn Førøya fólks verður latin privatfólki upp í hendurnar at selja fyri egnan vinning

HJALTI Í JÁKUPSSTOVU



**- Privatfólk hava selt burturav fólksins ognum. Tey, sum selja, kunnu stinga vinningin, 100-300 milliónir skattafrítt í lumman, at síggja til púra lógliga. Men hvar er eftirlitið við ognunum hjá landinum? spyr Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni**



Í lógini um vinnuligan fiskiskap stendur m. a. § 2. 2) 3)Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn Føroya fólks.

Á fleiri tíggjutals fundum hava føroyskar sendinevndir seinastu 10-12 árini í samráðingum við onnur strandalond vart áhugamálini hjá Føroyum í pelagisku stovnunum norðhavsild, svartkjafti og makrelí. Hetta í teirri trúgv, at tað var ogn Føroya Fólks, sum tær varaðu av. Nógvar kostnaðarmiklar rannsóknir hava eisini verið, at byggja undir føroysku krøvini. Komið er næstan á mál, og sigast kann við hampuliga góðum úrsliti. Harðastu mótpartarnir í hesum samráðingunum hava verið Noreg, Ísland og EU.

Men nú vísir tað seg, at tað var ikki ogn Føroya fólks samráðingarnar snúu seg um. Privatfólk hava síðan selt burturav hesum ognum til onnur feløg í Føroyum. Feløg, sum heilt ella í heilt stóran mun, eru íslendsk og norsk ogn. Fólkini, sum selja, kunnu stinga vinningin, 100-300 milliónir skattafrítt í lumman, at síggja til púra lógliga. Men hvar er eftirlitið við ognunum hjá landinum? Hvar eru Løgtingsgranskoðararnir? Og hvar er Landsgrannskoðarin, varðar hann ikki av ogn Føroya Fólks?

Á fundi á Hotel Føroyum í vár um tilfeingisgjald var vinnan, bæði eigara og manningarfeløg í móti slíkum akademiskum fjasi. Men í mínari verð kundi tilfeingisgjald í hesum førum verið latið, um ikki annað, so um skattin.

Alt gott um visjónir, men tað sum landið við hesum sølum, fleiri ferðir hevur latið gingið um seg, hevur einki við visjónir at gera. Alt annað.

# Nýtt Føroyakort við denti á ferðamál

**Í dag kemur út eitt nýtt Føroyakort til teirra sum ætla at ferðast í Føroyum – bæði føroyingar og útlendsku gestir okkara. Á kortinum eru nevniliga tey mest vitjaðu støðini í Føroyum víst við tekningum**

FERÐAVINNA

Tann sum hyggur í kortið sær tað sum verður kallað ferðamál ella attraktiónir - støð sum eru nógv vitjaði av ferðafólki. Á baksíðuni er so møguligt at lesa nærri um flestu støðini og hvørji tilboðini eru.

Støðini kunnu verða søvn, útferðir við báti, á hestbaki ella til gongu og onnur tilboð til ferðafólk. Eisini nøkur støð við serstakari náttúru ella útsýni og støð við nógvum fugli.

Kortið er ætlað at sjónliggera ferðamálini og møguleikarnar og samstundis at geva eitt yvirlit yvir alt landið. Kortið kemur afturat tí tilfari sum longu er tøkt: økisfaldarar fyri tey ymisku økini í landinum og aðrar ferðabóklingar og ferðakort.

Tað er ein áhugabólkur við Sjúrða Poulsen og Ólavi Poulsen, sum hevur tikið stig til hetta átakið í samstarvi við almennu ferðavinnuna, t. v. s. Ferðaráðið og Kunningarstovurnar kring landið.

Kortið verður borið ókeypis í hvørt hús í Føroyum og er avgjørt vert at goyma og hava við, tá farið verður at ferðast í egnum landi ella at taka fram og vísa øðrum hvat vit hava at bjóða. Kortið er eisini at fáa á øllum Kunningarstovunum og gistingarhúsum kring landið.

Virkir, fyritøkur, stovnar og onnur kunnu keypa kortið frá Kunningarstovunum kring landið ella frá forlagnum Føroya Met, um tey ynskja at geva viðskiftafólki, vinum og kenningum eitt kveikjandi minni.

Sóknast verður eftir

STJÓRA

til Pf. Postverk Føroya

Uppgávan

Postverk Føroya stendur á gáttini til eina nýggja, spennandi og avbjóðandi framtíð, nú tað er vorðið partafelag.

Í hesum sambandi søkja vit ein framskygdan og eldhugaðan stjóra, ið hevur úrslit fyri eyga. Høvuðsuppgávan verður at leggja eina langtíðarætlan fyri Postverk Føroya, soleiðis at Postverk Føroya gerst eitt nútímans, kappingarført felag. Tú fært, saman við einum dugnaligum leiðslubólki, høvuðsábyrgdina av strategiskari ráðlegging og framtíðarmenning av fyritøkuni.

Førleiki

Sterkir persónligir eginleikar so sum arbeiðssemi, ágrýtni, skapanarlyndi og slagdygd eru av alstórum týdningi. Postverk Føroya er eitt tænastufelag burturav, sum røkkur út til alt Føroya fólk, og tí er alneyðugt, at tú dugir væl við fólki, samskiftir skilliga og skynsamt, og skapar ein stimbrandi liðanda fyri alt felagið.

Tú hevur í minsta lagi 5 ára viðkomandi starvsroyndir. Tað er fyrimunur at hava starvsroyndir úr útheiminum, og at kunna vísa á úrslit. Tú hevur strategiska, búskaparliga útbúgving á kandidatstøði, sum t.d. Cand. Merc., Cand. Polit. ella Cand. Oecon.

Tú ert framskygd/ur, dugir væl at arbeiða strategiskt og málrættað, og megnar at skapa úrslit. Harumframt ert tú vanur/von at tosa og samskifta flótandi á føroyskum, donskum og enskum. Tosar tú eisini eitt fjórða mál, er hetta bert ein fyrimunur.

Postverk Føroyar bjóðar tær

Eitt avbjóðandi, fjølbroytt og spennandi starv. Starvið er eisini sera krevjandi, tí tú sum stjóri verður undangongumaður/kvinna, og fært høvuðsábyrgdina av allari framtíðarmenning av Pf. Postverk Føroya. Vit bjóða tær tí góða løn samsvarandi førleikum og royndum.

Postverk Føroya




UMSÓKN

Send okkum eina umsókn við viðkomandi prógvum og viðmælum áðrenn 1. juli 2006. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknin skal sendast til :

Pf. Postverk Føroya
att. Jan Danielsen
Óðinshædd 2
100 Tórshavn

Áhugað eru vælkomin at ringja til:
Jan Danielsen, nevndarform. á tlf. 21 72 00 ella
Brynhild Setberg, næstformann á tlf. 22 22 71,
fyri at hoyra nærri um starvið.



Postverk Føroya

Postverk Føroya · Óðinshædd 2 · FO-100 Tórshavn · Tlf: 34 60 00 · Fax: 34 60 01 · postur@postur.fo · www.postur.fo